KLAKSVÍKAR KOMMUNA
Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

# Klaksvíkar Býráð

**Dagfesting:** 21.03.2024 kl. 17:30
**Málnr.:** 21/01365 Gerðabók
**Nevndarlimir:** Karl Johansen, Atli S. Justinussen, Jógvan Skorheim, Gunvá við Keldu, Oddmar á Lakjuni, Jóhanna Christiansen, Eyðstein Ó. Poulsen, Óli M. Lassen, Signhild V. Johannesen, Tummas J. Lervig og Annika S. Biskopstø
**Varalimir:**
**Ikki møtt:**
**Onnur:** Rúni Rasmussen, kommunustjóri
**Protokollførari:** Jensa Anthoniussen, fulltrúi


| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til viðgerðar** | | |
| 19/24 | 24/00231-1 | Tilmæli um at fyrireika eina langtíðarætlan fyri Klaksvíkar kommunu |
| 20/24 | 24/00166-2 | Kirkjugarðarnir í býnum - staðfesting av nøvnum |
| 21/24 | 21/01966-16 | Krígsminni á matr.nr. 1308b |
| 22/24 | 24/00042-4 | Eykajáttan í samband við barnaansingartilboð til barn við serligum tørvi – *fyrra viðgerð* |
| 23/24 | 24/00323-4 | Eykajáttan til NBH |
| 24/24 | 24/00315-1 | Tilmæli um eykajáttanir fyri 2024 – *fyrra viðgerð* |


**Til viðgerðar**

## 19/24
## 24/00231-1 Tilmæli um at fyrireika eina langtíðarætlan fyri Klaksvíkar kommunu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Ferðslunevndin | 11.03.2024 | 9/24 |
| 2 Heilsunevndin | 11.03.2024 | 7/24 |
| 3 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 11.03.2024 | 29/24 |
| 4 Mentanarnevndin | 12.03.2024 | 23/24 |
| 5 Trivnaðarnevndin Børn og Ung | 12.03.2024 | 17/24 |
| 6 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir | 12.03.2024 | 10/24 |
| 7 Integratiónsnevndin | 13.03.2024 | 2/24 |
| 8 Havna- og Vinnunevndin | 13.03.2024 | 9/24 |
| 9 Tekniska Nevnd | 13.03.2024 | 12/24 |
| 10 Fíggjarnevndin | 19.03.2024 | 21/24 |
| 11 Klaksvíkar Býráð | 21.03.2024 | 19/24 |

**24/00231-1 Tilmæli um at fyrireika eina langtíðarætlan fyri Klaksvíkar kommunu**

**Frágreiðing um málið:**
Víst verður til skriv frá umsitingini, dagf. 1. mars 2024, sum greiðir nærri frá ætlanini at seta í gongd arbeiðið at fyrireika og gera eina kommunuætlan fyri Klaksvíkar kommunu. Hetta er ein ætlan og mál fyri alla kommununa, har høvuðsmálið er at samskapa eina enn betri og burðardyggari framtíð fyri øll í kommununi.

Sitandi býráð setir arbeiðið í gongd og myndar arbeiðið og hevur avgerandi ávirkan á ætlanina. Nýggja býráðið, sum tekur við 1. januar 2025, fær møguleika at geva sítt týðandi íkast til arbeiðið, og skal eisini samtykkja endaligu kommunuætlanina.

Ein kommunuætlan er ein strategi, ein heildarætlan við málrættaðum átøkum fram ímóti felags málum. Ein kommuætlan setir eina greiða ætlan fyri framtíðina og skal skapa virði fyri borgaran og allar partar í samfelagnum. Eisini er ein kommunuætlan eitt stýringsamboð, soleiðis at skiftandi býráð kunnu skipa og leiða kommununa inn í framtíðina.

Yvirskipað tíðarætlan er, at fyrireikingararbeiðið við ætlanini verður sett í gongd í mars 2024, meðan endaliga kommunuætlanin verður viðgjørd í nevndum og býráði og endaliga samtykt av býráðnum í apríl 2025.

**Burðardygd og heimsmálini:**
Arbeiðið er tætt knýtt at Heimsmálunum, sum er ein visión fyri eina burðardyggari framtíð fyri fólk og lond í 2030. Tey 17 Heimsmálini eru týðandi partur av strategiarbeiðinum í Klaksvíkar kommunu.

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Arbeiðið við kommunuætlanini er umfatandi og krevur nógva arbeiðsorku hjá starvsfólkum í kommununi og øðrum við. Arbeiðið at taka við áhugapartarnar í samfelagnum, tryggja gott grundarlag og gott samskifti er neyðugt og tíðar- og arbeiðskrevjandi. Mælt verður til, at 300.000 kr. verða játtaðar í ár til arbeiðið.
Tað kostar at gera og fremja eina framskygda kommunuætlan. Talan er um eina íløgu í framtíðina og komandi ættarlið. Í longdini fer ein kommunuætlan at vera við til at skapa fleiri og fjølbroyttar inntøkur.

**Tilmæli:**
Mælt verður til at samtykkja at fara í gongd við at fyrireika og gera eina kommunuætlan fyri Klaksvíkar kommunu eftir leistinum, sum er lýstur omanfyri.

**Ferðslunevndin 11. mars 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 01-03-2024.

**Heilsunevndin 11. mars 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagfest 01-03-2024.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 11. mars 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 01-03-2024.

**Mentanarnevndin 12. marts 2024:**
Nevndin tekur undir við UBN, dagf. 11-03-2024

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

**Trivnaðarnevndin Børn og Ung 12. mars 2024:**
Nevndin tekur undir við MeN, dagf. 12-03-2024.

**Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 12. mars 2024:**
Nevndin tekur undir við TrN B&U 12-03-2024

**Integratiónsnevndin 13. mars 2024:**
Nevndin tekur undir við TrN E&B 12-03-2024

**Havna- og Vinnunevndin 13. marts 2024:**
Nevndin tekur undir við InN, dagf. 13-03-2024

**Tekniska Nevnd 13. mars 2024:**
Nevndin tekur undir við HaVN 13-03-2024.

**Fíggjarnevndin 19. mars 2024:**
Nevndin tekur undir við TN 13-03-2024.

**Klaksvíkar Býráð 21. mars 2024:**
Tilmælið frá FíN 19. mars 2024 einmælt samtykt.

## 20/24
## 24/00166-2 Kirkjugarðarnir í býnum - staðfesting av nøvnum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 11.03.2024 | K-16/24 |
| 2 Mentanarnevndin | 12.03.2024 | 27/24 |
| 3 Tekniska Nevnd | 13.03.2024 | K-12/24 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 21.03.2024 | 20/24 |

**24/00166-2 Kirkjugarðarnir í býnum . staðfesting av nøvnum**

**Frágreiðing um málið:**
Gøtunavnanevnd býráðsins hevur á fundi 8. des. 2023 viðgjørt nøvn á kirkjugørðunum í Klaksvík.
Fyri at tryggja brúk av røttu nøvnunum framyvir sær nevndin fyri sær, at nøvnini verða skrásett á almenna kortið hjá Umhvørvisstovuni, samstundis sum skeltað verður við navnaskelti á staðnum.

Gøtunavnanevndin mælir avvarðandi nevndum og býráði til at staðfesta nøvnini á kirkjugørðunum í býnum sum (sí mynd niðanfyri)

1. *Gamli Kirkjugarður*
2. *Kirkjugarðurin á Ziskatrøð*
3. “Kirkjugarðurin við Oyrarvegin” verður broytt til *Kirkjugarðurin úti í Grøv*




**Burðardygd og heimsmálini:**
-

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:**
-

**Tilmæli:**
Vísandi til § 28, stk. 5 og § 41, stk. 1 í Kommunustýrisskipanini verður uppskot Gøtunavnanevndarinnar við hesum latið Mentanarnevndini og býráðnum til støðutakan.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 11. mars 2024:**
Tilmælið, dagf. 01-03-2024, verið til kunningar.

**Mentanarnevndin 12. marts 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 01-03-2024

**Tekniska Nevnd 13. mars 2024:**
Tilmælið, dagf. 01-03-2024, verið til kunningar.

**Klaksvíkar Býráð 21. mars 2024:**
Tilmælið frá MeN 12. mars 2024 einmælt samtykt.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

**21/24**
**21/01966-16 Krígsminni á matr.nr. 1308b**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | 11.03.2024 | 32/24 |
| 2 Mentanarnevndin | 12.03.2024 | 24/24 |
| 3 Fíggjarnevndin | 19.03.2024 | 23/24 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 21.03.2024 | 21/24 |

**21/01966-16 Krígsminni á matr.nr. 1308b**

**Frágreiðing um málið:**
Borgari ynskir at fáa flutt/ella niðurtøku av einum krísminni (lóðurgoymslu) á sínum matrikli.
Fyrisitingin hevur verið í samband við Tjóðsavnið um flyting/varðveiting av lóðurgoymslu, sum stendur á matr.nr. 1308b. Tjóðsavnið hevur svarað, at tey vilja ikki standa fyri at flyta lóðurgoymlsuna ella á annan hátt veita fíggjarligan stuðul.
Málið hevur verið fyri hjá Fornminnisnevndini, ið staðfesti, at lóðurgoymlsan ikki er partur av nakrari heild viðvíkjandi Krígsminnaøkinum.
Tjóðsavnið bjóðar sær til at gera eina fornfrøðiliga skráseting og eina 3D skráseting av bygninginum.

Klaksvíkar kommuna hevur ikki sett pening av til hetta endamál, umframt at tað ikki er gjørd nøkur faklig meting av, hvat tað fer at kosta at tryggja og flyta lóðurgoymsluna til aðra hóskandi staðseting.

Tí mælir fyrisitingin til, at málið verður slept, og tað tískil verður upp til eigaran av matrikul 1308b og Tjóðsavnið at koma ásamt um, hvat er at gera.

Niðurtøka:
Heimildin at loyva niðurtøku liggur ikki hjá kommununi, tí avgerðarrætturin liggur hjá Tjóðsavninum/ Friðingarmyndugleikanum. Hetta kemur av, at talan er um leivd frá krígnum og ikki ein vanligan bygningslut, sum skal niðurrívast.

Brot úr løgtingslóg nr. 19 frá 16. september 1948 um friðan av fornminnum og bygningum

> **§ 5.** Ynskir ánarin av byggningi, ið stendur á listanum, at ríva hann niður, skal hann 3 mánaðir frammanundan geva landsstýrinum boð um tað. Heldur stýrið eftir ummælinum frá fornminnisnevndini, at tað er ikki nóg stór grund til at seta seg ímóti niðurríving, fær ánarin boð um hetta, og ánarin kann eftir móttøku av hesi frásøgn fara undir niðurrívingina. Heldur landsstýrið, at byggningurin er verdur at varðveita, kann tað gera tiltak til at ogna hinum almenna hann, um neyðugt við tøku, við peningsveitan á fíggjarlógini ella við serligari lóg. Í slíkum føri kann ánarin ikki fara undir niðurrívingina, áðrenn tað er endaliga avgjørt, at hitt almenna ikki ynskir at ogna sær byggningin.

**Burðardygd og heimsmálini:**
MÁL 11. Gera býir og búsetingar inkluderandi, tryggar, haldgóðar og burðardyggar

**Lógargrundarlag:**
Kommunufulltrúin
*Løgtingslóg nr. 19 frá 16. september 1948 um friðan av fornminnum og bygningum* og skjal *Mentamálráðið - Krígsminni frá seinna heimsbardaga eru friðað.*

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

Eingin avseting til varðveitan av lóðurgoymslu.

**Tilmæli:**
Fyrisitingin mælir til, at málið verður slept, og at Tjóðsavnið og eigarin av matr.nr. 1308b verða kunnað um, at kommunan ikki ger meiri við málið.

**Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 11. mars 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 04-03-2024.

**Mentanarnevndin 12. marts 2024:**
Ein meiriluti, JCC, ASJ, GvK, SVJ tekur undir við UBN, dagf. 11-03-2024
Ein minniluti, ÓML mælir til at tað verður flutt á ognina matr.nr. 1183a hjá NBH.

**Fíggjarnevndin 19. mars 2024:**
Ein meiriluti, KHJ, ASJ og OáL, tekur undir við meirilutanum í MeN 12-03-2024.
Ein minniluti, JS og TJL, tekur undir við minnilutanum í MeN 12-03-2024.

**Klaksvíkar Býráð 21. mars 2024:**
Atkvøtt varð um soljóðandi broytingaruppskot frá JS: "*Mælt verður til, at málið verður kannað betri, og at loysnir til staðseting og kostnaðarmeting verða lagdar fyri nevnd aftur.*"; tað varð samtykt 10 atkvøðum fyri (KHJ, ASJ, OáL, JCC, EÓP, JS, SVJ, TJL, ÓML og ASB), og ongari atkvøðu ímóti. GvK atkvøddi ikki.

## 22/24
## 24/00042-4 Eykajáttan í samband við barnaansingartilboð – *fyrra viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin Børn og Ung | 12.03.2024 | 18/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.03.2024 | 18/24 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 21.03.2024 | 22/24 |
| 4 Klaksvíkar Býráð | 24.04.2024 | |

**24/00042-4 Eykajáttan í samband við barnaansingartilboð**

**Frágreiðing um málið:**
Greitt verður nærri frá málinum í skrivi frá umsitingini, dagf. 1. mars 2024, men í stuttum snýr málið seg um at skipa eitt barnaansingartilboð av eitt sindur serligum slag í Barnahúsinum Margit.

**Burðardygd og heimsmálini:**
-

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 45 frá 30. apríl 2018:

> *§ 6. Avvarðandi kommuna og foreldur rinda tær útreiðslur, sum standast av virkseminum sambært hesi lóg. Foreldragjaldið skal tó í mesta lagi vera 30% av rakstrarútreiðslunum.*

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Tilsamans kr. 547.200 fyri tíðarskeiðið (sí annars frágreiðingina frá umsitingini, dagf. 1. mars 2024).

Mælt verður til at veita eykajáttan til Námsfrøðiligu Ráðgevingina í fyribils eitt hálvt ár. Hetta soleiðis at eitt støðugt dagstovnspláss kann tryggjast.

Framman undan hesum er NR hart spert fíggjarliga við verandi játtan, og tí er ikki fíggjarligt rásarúm til hesa nýggju eykaútreiðslu innan verandi játtan.

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyristandandi, verður mælt nevndum og býráði til, at rakstrarstað nr. 02211370040 "NR Námsfrøðiliga ráðgevingin" fær eina eykajáttan á kr. 547.200, ið verður veitt av tøkum peningi.

**Trivnaðarnevndin Børn og Ung 12. mars 2024:**
Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum frá umsitingini dagfest 01.03.2024

**Fíggjarnevndin 19. mars 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 01-03-2024, men mælir til at taka spurningin um gjald til Power Care upp við Almannaverkið.

**Klaksvíkar Býráð 21. mars 2024:**
Tilmælið frá FíN 19. mars 2024 einmælt samtykt.

## 23/24
## 24/00323-4 Eykajáttan til NBH

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir | 12.03.2024 | 12/24 |
| 2 Fíggjarnevndin | 19.03.2024 | 19/24 |
| 3 Klaksvíkar Býráð | 21.03.2024 | 23/24 |

**24/00323-4 Umbøn frá NBH um framflyting av ikki-brúktum játtanum**

**Frágreiðing um málið:**
Í telduposti heitir stjórin fyri NBH á Klaksvíkar kommunu um at viðgera eina umbøn um eykajáttan (framflyting av ikki-brúktum játtanum frá 2023 til 2024).
Stýrið fyri NBH kann veita eykajáttan, men krevur tað tvær viðgerðir, har samstarvandi kommunurnar samtykkja eykajáttanina millum 1. og 2. viðgerð. Næsti stýrisfundur verður ætlandi 23. mai.

Vísandi til frágreiðingarnar og útgreiningarnar í viðfesta tilmæli og samtykt í stýrinum fyri NBH, verður málið við hesum lagt fyri avvarðandi nevndir (Eldri og Bústaðir og Fíggjarnevndina) og býráðið.

**Burðardygd og heimsmálini:**
Tað vísir seg, at tørvurin á eldraøkinum er ógvuliga stórur og eisini akuttur, og tí hevur ein eykajáttan til NBH týdning í mun til eitt nú heimsmál nr. 3: Tryggja øllum heilsugott lív og virka fyri trivnaði fyri øll í øllum aldri.

**Lógargrundarlag:**
Eldralóggávan.

**Fíggjarligar avleiðingar:**
Kommunan er fyri stuttum komin niður um eina álíkning í skuld, og støddin av framflytingum – bæði hesar ætlaðu hjá NBH og tær ætlaðu hjá KK sjálvari (sí annað mál hetta umfarið) – hava árin á víðari gongdina á tí økinum.

Eisini hava framflytingar ávirkan á tøka peningin (likviditetin) hjá kommununi, sum upp á sikt má styrkjast

Somuleiðis kann viðmerkjast, at framflytingarnar hjá NBH (í stóran mun) eru rakstrarjáttanir, sum vanliga ikki verða fluttar fram, so helst er rættari í hesum føri at tosa um eina vanliga eykajáttan í 2024, sum NBH her hevur tørv á og biður um.

**Tilmæli:**
Vísandi til omanfyristandandi og viðfestu stýrissamtykt í NBH 29-02-2024, verður málið lagt fyri avvarðandi nevndir og býráðið til støðutakan, sum síðan verður sent NBH áðrenn teirra seinnu viðgerð av hesum máli.

**Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 12. mars 2024:**
Ein meiriluti, GvK, SVJ og ASB tekur undir við stýrissamtyktini frá NBH dagf. 29.02.24.
Ein minniluti, OáL og JCC tekur ikki undir við stýrissamtyktini frá NBH dagf. 29.02.24.

**Fíggjarnevndin 19. mars 2024:**
Ein meiriluti, KHJ, ASJ, TJL og JS, tekur undir við meirilutanum í E&B 12-03-2024.
Ein minniluti, OáL, tekur undir við minnilutanum í E&B 12-03-2024.

**Klaksvíkar Býráð 21. mars 2024:**
Atkvøtt varð um meirilutatilmælið frá FíN 19. mars 2024; tað varð samtykt 9 atkvøðum fyri (KHJ, ASJ, GvK, EÓP, JS, SVJ, TJL, ÓML og ASB) og ongari atkvøðu ímóti. OáL og JCC atkvøddu ikki.

## 24/24
## 24/00315-1 Tilmæli um eykajáttanir fyri 2024 – *fyrra viðgerð*

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin | | |
| 2 Mentanarnevndin | | |
| 3 Trivnaðarnevndin Børn og Ung | | |
| 4 Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir | | |
| 5 Havna- og Vinnunevndin | | |
| 6 Tekniska Nevnd | | |
| 7 Fíggjarnevndin | 19.03.2024 | 20/24 |
| 8 Klaksvíkar Býráð | 21.03.2024 | 24/24 |
| 9 Klaksvíkar Býráð | 24.04.2024 | |

**24/00315-1 Tilmæli um eykajáttanir fyri 2024**

**Frágreiðing um málið:**
Við hesum verða eykajáttanir lagdar fyri nevndir og býráð til viðgerðar og støðutakan.

Ynski eru um at flyta 20,2 mkr. fram. Fíggjarætlanin javnvigar við 7 mkr. í avlopi, og um býráðið samtykkir eykajáttanina, fer fíggjarætlanin at vísa 13,2 mkr. í halli, og saman við áður samtyktu eykajáttan til Varpið á 3 mkr. verður hallið í ár 16,2 mkr.

Roknskapurin fyri 2023 vísir í dag avlop upp á 8,5 mkr. Mett verður, at har eru rokningar fyri netto 3,4 mkr. eftir at bóka, og við hesum verður avlopið upp á 5 mkr.

**Gjaldførið**
Við ársenda 2023 var innistandandi 15 mkr., og saman við trekningsrættinum í Bank Nordik upp á 20 mkr. er tøki peningurin 35 mkr. Tær 20 mkr. hava samband við lántøkuna í januar 2023 á 40 mkr., har 20 mkr. eru hevaðar í 2023, og restin (20 mkr.) er at brúka í 2024.

**Bankaskuld og nettoskuld**
Við ársbyrjan 2024 var bankaskuldin 358,5 mkr., og við ársenda 2024 er hon mett at verða 372 mkr.

Lántøkan hevur samband við 40 mkr. lánið í Bank Nordik, sum varð tikið í januar 2023. Í 2023 vóru 20 mkr. Brúktar, og restin (20 mkr.) verður hevað í 2024.

Í fíggjarætlanini fyri 2024 eru 7 mkr. settar av til avdráttir.

Framrokning vísir, at við ársenda 2023 er nettoskuldin 13 mkr. undir eina álíkning.

Víst verður á avtaluna við FMR frá 2021 um lántøkurnar ísbv., at nettoskuldin er oman fyri eina álíkning. Sambært henni eru lántøkurnar treytaðar av, at kommunan kemur undir skuldarmarkið við ársenda 2024.

Á talvuni niðanfyri eru ynski um eykajáttanir fyri 20,2 mkr. Eykajáttanin til Varpið (3 mkr.) er ikki við í talvuni.

Sum fíggjarstøðan er í løtuni, verður mælt til varsemi, og verður í hesum sambandi víst á málið í februar 2023 um afturgjaldsætlan av bankaskuldini. Somuleiðis eiga eykajáttanir at hava støði í langtíðarætlanum við fokus á fíggjarliga haldførið hjá kommununi, so at kommunan er fyrireikað at taka móti avbjóðingunum, sum liggja fyri framman.

**Eykajáttanir**
Á talvuni niðanfyri eru ynski um eykajáttanir (framflytingar/eykajáttanir) fyri samanlagt 20,2 mkr. Av hesum er rakstur 883 tkr. og restin íløgur.

**Ymisku økini:**

**<u>Grein 1 Kommunal fyrisiting (Fíggjarnevndin)</u>**
**Innbúgv til býráðsfundir**
Neyðugt er við eykajáttan á 550.000 kr. til býráðsinnbúgvið, sum skal brúkast í býarsalinum í Varpinum, har býráðsfundirnar nú verða hildnir.

**KT-supportari**
Grundað á stóra tørvin hjá Klaksvíkar kommunu og NBH á KT-økinum, bleiv lýst eftir KT-supportara við ársenda 2023, og byrjar nýggjur KT-supportari 4. mars.

**Umvæling av býráðshúsinum**

Arbeiðið at umvæla og tryggja býráðshúsið er í gongd. 2 mió. kr. vórðu játtaðar fyri 2023. Óbrúkta játtanin er 932.000 kr. Mælt verður til, at íløgujáttanin Kommunubygningur undir grein 1 verður hækkað við 932.000 kr.

**Kommunuætlan**
Fyrisitingin mælir Klaksvíkar Býráði at samtykkja at seta gongd í arbeiðið at gera eina neyðuga og umfatandi langtíðarætlan, kommunuætlan. Arbeiðið við at fyrireika og gera eina kommunuætlan krevur eyka fíggjartilfeingi í ár, og tí verður mælt til at eykajátta 300.000 kr., Kommunufyrisiting.

**Grein 3: Børn & ung – Trivnaðarnevndin Børn og Ung**
**Barnaansingartilboð til barn við serligum tørvi (j. nr. 24/00042)**
Talan er um eitt barn við serligum tørvi, sum krevur serligar skipanir. Tilmælið er eykajáttan á kr. 583.200. Víst verður til eykjáttanarmálið 24/00042-4 (Eykajáttan í samband við barnaansingartilboð til barn við serligum tørvi) og samtykt í fíggjarnevndarfundi 19. mars, har tikið verður undir við tilmæli frá Trivnaðarnevndini Børn og Ung (14. mars 2024), men mælir til at taka spurningin um gjald til Power Care upp við Almannaverkið.

**Grein 3 Eldraøkið - Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir**
**NBH - eykajáttan/framflyting** sí Mál 24/00323-4 Umbøn frá NBH um framflyting av ikki-brúktum játtanum 2023 – TrN eldri og bústaðir.

**Grein 4 Undirvísing - Trivnaðarnevndin Børn og Ung**
**Útiøki C á Skúlatrøð**
Verkætlan er í gongd. Mælt verður at flyta fram restjáttan á 1.628.665 kr.

**Grein 5 (Mentanarnevndin)**
**Hornaskýlið**
Arbeiðið uppá hornaskýlið Eystur á Djúpumýru er byrjað, og bleiv øll játtanin fyri 2023 ikki brúkt. Mælt verður til at flyta fram óbrúktu játtanan fyri 2023 áljóðandi 1 mió kr.

**Samanbygging (Klaksvíkar Bókasavn)**
Tað er samtykt at gera ein bygning, sum tvinnaði Bókasavnið saman við gamla Isenkram-bygningin, har eitt barnabókasavn er gjørt til reiðar, soleiðis at vit klára okkum við sama tali av starvsfólkum. Mælt verður til at játta óbrúkta játtan frá 2023 áljóðandi kr. 317.956.

**Grein 6 Teknisk mál (Umhvøvis- og býarskipanarnevndin og Tekniska nevnd)**
**Umhvørvis- og býarskipanarnevndin**
**Hotellið í miðbýnum**
Arbeiðið fór seinni í gongd, enn væntað; avsetingin fyri 2024 leggur upp til, at restupphæddin í 2023 verður flutt fram. Mælt verður til at eykajátta 3.797.226 kr.

**Kloakk/spillivatn/avvatning**
Arbeiðið við avvatning av vestursíðuni er í gongd. Mælt verður til at eykajátta 658.963 kr.

**Tekniska nevnd**
**Parkeringøkið við Stangavegin (Kongaríkið)**
Arbeiðið er í gongd, men hevur gingið seinni, enn væntað, og tí er neyðugt at framflyta restupphæddina. Mælt verður til at eykajátta 883.878 kr.

**Smiðjan**
Talan er um útbygging av smiðjuni, arbeðið er í gongd. Mælt verður til at eykajátta 161.485 kr.

**Vatn**
Neyðugt er við fígging til vatnleiðing Norð um Fjall og talgilding av vatnverki. Mælt verður til at eykajátta 615.748 kr.

**<u>Grein 7 Kommunalt virki (Havna- og Vinnunevndin)</u>**
**Útfylling í Norðhavnini**
Hetta arbeiðið skuldi eftir ætlan verið liðugt í fyrru helvt av 2023, men av ymsum ávum er arbeiðið nógv seinkað. Nú er farið í gongd við at flyta grótið til Norðhavnina, og tískil er neyðugt, at játtanin verður flutt til 2024. Óbrúkta játtanin er 8,3 mió. kr.

**Keyp av gróti frá TTS**
Tað er samtykt, at Klaksvíkar kommuna skal samráðast við TTS um keyp av gróti, um KK hevði tørv á tí, tá TTS fór í gongd við at grava út. Eftir ætlan verður hetta í ár, og tískil eru samráðingar farnar í gongd um at keypa grótið. Tað er í løtuni ikki gjørligt at áseta eina upphædd á hetta, tí hetta er treytað av bæði prísi og nøgd.

**Bátadráttur í Klaksvík**
Avtalað varð við arbeiðstakara í 2023 at gera bátadráttin í Klaksvíkini í stand, soleiðis at hann er tryggur at brúka. Mælt verður til at framflyta óbrúktu játtanina áljóðandi kr. 470.000,- til 2024.

**<u>Burðardygd og heimsmálini:</u>**
Tað er týdningarmikið, at burðardygd og Heimsmálini verða tikin við í arbeiðið við eykajáttanum fyri 2024. Havast skulu í huga langtíðaravleiðingar í bæði rakstrarpartinum og íløgupartinum við atliti at burðardyggari menning av Klaksvíkar kommunu. Neyðugt er at tryggja, at grundleggjandi tænastur til borgarar og onnur í kommununi verða tryggjaðar á haldførari grund, og at íløgur taka støði í tøka fíggjarliga tilfeinginum og í framtíðartørvinum í kommununi.

**<u>Lógargrundarlag:</u>**
Kommunustýrislógin.

**<u>Fíggjarligar avleiðingar:</u>**
Samlaða upphæddin á eykajáttanaryvirlitinum er 20,2 mió. kr. Afturat hesum kemur eykajáttanin til Varpið á 3 mkr., sum varð játtað í býráðnum februar.

**<u>Tilmæli:</u>**
Við hesum verður 1. viðgerð av eykajáttanunum 2024 lagdar fyri avvarðandi nevndir og Býráð til viðgerðar og støðutakan.

**<u>Umhvørvis- og Býarskipanarnevndin 11. mars 2024:</u>**
Ein meiriluti, GvK, OáL og JCC, tekur undir við tilmælinum, dagf. 01-03-2024.
SVJ og JS taka støðu í býráðnum.

**<u>Mentanarnevndin 12. mars 2024:</u>**
Ein meiriluti, JCC, ASJ, GvK og ÓML, tekur undir við tilmælinum, dagf. 01-03-2024.
SVJ tekur støðu í býráðnum.

**<u>Trivnaðarnevndin Børn og Ung 13. mars 2024:</u>**
Málið er til viðgerð og ikki til kunning.
Ein meiriluti, EyÓP, JCC og ASJ taka undir við MeN, dagf. 01-03-2024. Tó við tí rætting, at játtanin til Námsfrøðiligu Ráðgevingina verður 548.000.

Postboks 2 . FO-710 Klaksvík . Føroyar . Tlf. 410000

Ein minniluti, JS og TJL taka støðu í býráðnum.

**Trivnaðarnevndin Eldri og Bústaðir 13. mars 2024:**
Ein meiriluti, GvK, OáL og JCC, taka undir við meirilutanum í TrN B&U, dagf. 12-03-2024.
Ein minniluti, SVJ og ASB, taka støðu í býráðnum.

**Havna- og Vinnunevndin 13. mars 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dgf. 01-03-2024.

**Tekniska Nevnd 13. mars 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 01-03-2024.

**Fíggjarnevndin 19. mars 2024:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 01-03-2024, tó við hesum viðmerkingum:

- víst verður til samtyktina í máli 18/24 fyrr á fundinum *Barnaansingartilboð til barn við serligum tørvi*, har nevndin tekur undir við tilmælinum, dagf. 01-03-2024, men mælir til at taka spurningin um gjald til Power Care upp við Almannaverkið
  at 300.000 kr. verða veittar til verkætlanina “Undirsjóvarakvarium” á Norðoyri (mál nr. 23/01222)

**Klaksvíkar Býráð 21. mars 2024:**
Atkvøtt varð um tilmælið frá FíN 19. mars 2024; tað varð samtykt 10 atkvøðum fyri (KHJ, ASJ, GvK, OáL, JCC, EÓP, JS, TJL, ÓML og ASB) og ongari atkvøðu ímóti. SVJ atkvøddi ikki.

Fundurin lokin kl. 19:30